## Átrúnaður og náttúra í Smiðjuni



Átrúnaður og føroysk myndevni seta dám á listaframsýning hjá Onnu Byrgadóttir, sum letur upp í Smiðjuni í Lítluvík fríggjadagin. Framsýningin umfatar eina røð av naturalistiskum oljumálningum við føroyskum myndevnum. Í øðrum málingum á framsýningini hevur listakvinnan leitað sær íblástur í tí átrúnaðarliga. Anna Byrgadóttir er 38 ára gomul. Hon hevur nomið sær kunnleika á Listaháskúla á Langeland og í Holbæk. Hon hevur fyrr sýnt fram í Smiðjuni, Leikalund og á Ólavsøkuframsýning. Ferniseringin er fríggjadagin 4. apríl kl 16. Framsýningin er opin fram til 8. apríl allar dagar frá klokkan 12 til 18, tó sunnudag frá 14-18.

## Hugni fyri krabbaraktar kvinnur

Bólkurin fyri kvinnur, sum hava ella hava havt krabbamein í undirlívi, fer nú aftur at hittast til prát og hugnaliga samveru. Fyrsta hugnaløtna í hesum umfari verður týskvøldið 8. Apríl 2008 kl. 19 í hølunum hjá Føroya Felag móti Krabbameini á Grønlandsvegi 58 í Havn. Ætlanin er at hava eina hugnaliga løtu saman, har kvinnurnar kunnu tosa, stuðla, hjálpa hvør aðrari og veita hjálp til sjálvhjálp. Umframt at geva kvinnunum høvi at koma saman, er endamáli við sjálvhjálpanarbólkinum at vera málgagn og fremja áhugamál hjá kvinnum við krabbameini í undirlívinum. Eisini hevur bólkurinum mál at savna royndir og vitan á øllum økjum, sum viðkoma hesi krabbasjúkuni.

ave

# Bar seg at sum ein kraftidiot

**Ákærdi bar seg at sum ein kraftidiot, og tað er hann til reiðar at gjalda fyri, sigur verjin hjá manninum, sum nú er ákærdur fyri drápsroynd. Fútin sigur, at tað er púra greitt, at endamálið var at drepa og at seta eld á, og tað eigur hann at revsast fyri**

NEVNINGATING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Maðurin viðurkennur at hann breyt inn og at hann hótti. Men tað ger hann bara til ein kraftidiot og ikki til drápsmann, sigur verjin hjá manninum, sum nú í eina heila viku hevur verið í Føroya Rætti, har hann er ákærdur fyri drápsroynd*

*Modelmynd*

Ákærdi bar seg at sum ein tápulingur, men tað var ongantíð ætlanin at drepa nakran og tað var ongantíð ætlanin at brenna nøkur hús niður.

Verjin hjá manninum, sum alla hesa vikuna hevur verið fyri einum nevningatingi, har hann er ákærdur fyri drápsroynd, er alt annað enn samdur við fútanum.

Sum vit hava greitt frá í fleiri Sosialum hesa vikuna, breyt hann seg inn á ein mann við eini øks, einum reipi og út um botnin av bensini í einum dunki.

Málið hevur verið fyri alla vikuna, men nú er viðgerðin liðug. Fyrrapartin í dag førdi fútin og verjin hjá manninum síni sjónarmið fram og í morgin fara teir 12 nevningarnir so at gera av um hann er sekur ella ikki.

### Kraftidiot

Verjin kravdi at maðurin varð frídømdur, ella at hann í ringasta føri varð dømdir linastu revsing.

Hann dugdi ikki at síggja nakra orsøk til at ákærdi skuldi vilja manninum til lívs.

Hann hevði orðini hjá sálarfrøðingi fyri, at hann var ikki sinnissjúkur og talan var ikki sum svartsjúku og tað eru akkurát hesi bæði fyribrigdini, sum eru orsøkin til so at siga øll av teimum fáu morðum, sum eru í Føroyum.

Orsøkin var, at hann var rætt og slætt trillrundur av drykkjuskapi.

Tað, sum fór fram, var ikki úrslitið av eini drápsætlan, men talan var um eina moralska atsókn.

Leysasøgur gingu um, at maðurin var barnalokkari og tí skuldi hann hava ein lærupenga og í hesum føri var tað moralisturin, sum tók ræðið á honum og bæði øksin, bensindunkurin og reipið skuldi brúkast at hótta við og onki annað.

Men tað ger hann ikki til drápsmann.

Verjin vísti eisini til reaktiónina, tá ið ákærdi vaknaði í varðhaldinum morgunin eftir.

Tá spurdi hann um hann ikki kundi sleppa út, tí hann skuldi lukkast við einum bussi hjá bygdaleiðum og verjin helt, at tað var ein heilt óhugsandi reaktión hjá einum, sum hevði ætlað at drepa og seta eld á. Hevði tað verið ætlanin, hevði hann eisini vitað, at hann slapp ikki út.

Kortini viðurkendi maðurin, at hann hevði brotið inn við bensini, øks og reipi og hann viðgekk at hann hevði hótt.

- Hann bar seg at sum ein kraftidiot. Tað veit hann sjálvur av og tað er hann eisini til reiðar at betala fyri.

Men verjin helt, at tað hevði verið stórur skaði at dømt hann fyri manndráp.

### Ætlanin var greið

Hinvegin krevur fútin, at tann ákærdi verður dømdur fyri drápsroynd og fyri at hava roynt at seta eld á.

Fútin ivast ikki í, at maðurin hevði bæði dráp og eldáseting í kvittanum, tá ið hann breyt inn í eini hús á náttartíð síðsta summar.

Men kann hann ikki dømast fyri beinleiðis drápsroynd og fyri at royna at seta lívið hjá øðrum í álvarsligan vanda við at seta eld á, vil fútin hava hann dømdan fyri linari lógarbrot, eitt nú serliga ráan og álvarligan harðskap, ella í minsta lagi bara fyri harðskap og fyri eina linari áseting um eldáseting.

Fútin vísti til vitnini, serliga politistarnir, sum søgdu, at ákærdi hevði sagt, at maðurin skuldi drepast. Hann vísti eisini til mannin, sum varð álopin, til telefonsamrøðuna við alarmsentralin og til hini prógvini, vit hava umrøtt í Sosialinum hesa vikuna.

Fútin sipaði eisini til, at ákærdi hevði sagt fyri onkrum vitnum, hann hevði ballast við, at maðurin skuldi drepast og húsini brennast niður og at hann var væl útgjørdur til endamálið við bæði bensini, øks og reipi.

- Maðurin má hava vitað, at hann setti lív og heilsu hjá øðrum í álvarsligan vanda við at seta eld á húsini.

Fútin staðfesti eisini, at sálarliga kanningin vísti, at maðurin var so mikið væl fyri, at hann toldi at verða revsaður.

Men kanningini vísti eisini, at hevði lyndi til at handla, meiri útfrá sinnisørslu, heldur enn at hugsa seg um og at hann eisini hevði lyndi til at handla óskipaði í yvir-stimuleraðum støðum.

Fútin meinti eisini, at viljin til at fullføra verkið avgjørt var til staðar og tí átti revsingin eisini at vera eftir teimum strongu ásetingunum í revsilógini.

